# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Perlur í miðbýnum í Havn

Nógv tøk eru tikin fyri at fáa ein meira virknan og glaðan miðbý í Havn hesi seinastu árini. Her hugsa vit sertakliga um royndirnar at skapa eitt livandi mentanarligt umhvørvi í tí partinum av býnum, sum liggur rundan um Vágsbotn. Her er komin ein perla fyri og onnur eftir, og loksins fingu vit so Perluna eisini. Men kortini er neyvan seinasta orðið sagt. Menningin og framburðurin fer at halda fram.

Seinasta frambrotið í økinum varð tá borgarstjórin tók Perluna í Tórsgøtu í brúk, tá Altjóða Sálarheilsudagurin varð settur í nýggja bygninginum 10. oktober.

Við nýggju Perluni er tikið enn eitt týðandi stig til tess at skapa nýtt lív í henda so týðandi og søguliga partin av Havnini. Glasbygningurin millum Reinsaríið og Miðlahúsið fer uttan iva at skapa enn meira lív í grannalagnum, har hann verður partur av tí virksemi, sum longu er skapt í økinum. Tórshavnar Býráð hevur við hesum seinasta stiginum víðkað um karmarnar, soleiðis at tónleikur og annað mentanarligt virksemi hava fingið uppaftur betri kor at virka undir.

Vit skulu so heldur ikki gloyma aðrar týdningarmiklar avgerðir at menna og fáa lív í aftur henda partin av Havnini. Ein teirra var Margarinfabrikkin, sum hevur latið dyrnar upp fyri ungdóminum og er partur av hesi menning. Har er Tjóðarpallurin, sum nú leingist eftir uppaftur betri umstøðum. Og leita vit longur oman í Vágsbotn síggja vit eisini frambrotini har um leiðir. Müllers Pakkhús er enn ein perla. Fyri stuttum kundi Grafiski verkstaðurin lata upp í gamlu fabrikkini hjá Østrøm, ein vælabygningur, sum aftur er komin til sín rætt og hvørs virksemi uttan iva fer at draga nógv listafólk, føroyingar sum útlendingar henda vegin.

Hóast nógv er hent í økinum, so eru møguleikarnir framvegis nógvir at gera økið enn meira áhugavert og spennandi. Har er t.d. Skeiva pakkhús, sum kommunan eitt skifti ætlaði at keypa og seta í stand. Tann ætlanin varð so av ongum, men spurningurin er helst bara um tíð til tann verkætlanin verður tikin framaftur. Alt hetta fær okkum eisini til at hugsa um Býarsavnið. Hesin stovnur, sum enn tørvar eini hóskandi høli, eigur avgjørt at verða raðfestur hægri, soleiðis at býurin fær sítt savn.

Samanumtikið kunnu vit siga, at nógv er komið burtur úr at fáa nýtt lív í henda partin av gomlu Havnini. Men nógv er eisini eftir at gera, og vit senda við hesum býarpolitikarum og umsiting og øðrum, sum hava tilnýti til umrøddu mál og øki, góðynski og við vón um, at tað fer at eydnast at halda fram við menningini, soleiðis at hesin parturin av Havnini kann gerast tann magnetur hann var fyrr. Vit mugu so heldur ikki gloyma tann týdning sum handilslív og vinna eisini hava fyri at skapa lív og virksemi í økinum.

**Sosialurin**

## Miseydnað klumma

HELGI ABRAHAMSEN



**Tað er blivið moderna at skriva "klummur". Skrivað verður við einum ávísum skálkabrosi um aktuel mál**

Summi duga sera væl at skriva klummur, meðan onnur fella í ta grøvina, at tey halda, at endamálið er at gera gjøldur burtur úr kendum persónum, men hetta verður so illa undirbygt, at tann sum kannar eftir, finnur skjótt útav, at skrivarin hevur misskilt evnið sum skrivað verður um.

Eitt dømi um hetta stóð í vikuskiftis Sosialinum, tann 16. oktober.

Undir yvirskriftini "Hvat í himmalsins navni sigur tú, harra løgmaður"? Skrivar Heini í Skorini ógvuliga dramatiskt um úttalilsini hjá løgmanni um tunlar norður um Fjall: " *Allur tingsalurin heldur andanum, tá hann ressast úr stólinum...*" "*Tíðin er komin til at traðka í karakter*" o.s.fr. - Og so sigur løgmaður í roynd og veru einki.

Heini í Skorini skrivar: "*Sjálvur ressaðist eg við, tá tingformaðurin beyð Kaj Leo Johannesen orðið*". Eg veit ikki, um hetta skal skiljast soleiðis, at Heini var sovnaður, og vaknaði tá løgmaður fekk orðið. Men tað er í øllum førum spell, at hann ikki ressaðist við eitt sindur fyrri, tí hatta sum hann endurgevur, er bara ein viðmerking, sum kom aftaná sjálva røðuna.

Løgmaður helt fyrst eina røðu, har hann... - ja tú kanst gott kalla tað "traðkaði í karakter". Aftaná røðuna fekk hann ein spurning frá einum tingmanni, sum spurdi, hvat hann roknaði við fór at verða broytt, tá fíggjarlógin kom aftur úr fíggjarnevndini. Og tá var tað, at hann svaraði við orðunum, sum Heini í Skorðini helst hevur skilt sum sjálva røðuna.

Men lat meg nú ikki taka mótið frá klummuskrivaranum hjá Sosialinum. Hann skal endilig halda á við at skriva klummur. - Men eg loyvi mær tó at ynskja honum betri eydnu næstu ferð.

## Tøkk til Andreas Berglíð

ÓLI JACOBSEN



Andreas Berglíð og eg vóru saman í nevndini í fiskimannafelagnum í eini 15 ár. Eg kenni hann bert sum ein loyalan nevndarlim eins og hinar í nevndini. Vóru ósemjur um einstøk mál, royndu vit altíð at tosa okkum til sættis.

Tískil hevur Andreas skrivað undir hvønn fund í gerðarbókini. Hann hevur ikki havt serstøðu í nøkrum týðandi máli. Allar ársfrágreiðingar hjá felagnum hava verið einmælt góðkendar, eisini av nevndini. Tað skal hann hava tøkk fyri.

Tey sjónarmið, sum hann nú kemur við gretti hann ikki í »okkara« tíð. Støðið hjá honum verður lýst við pástandin um, at eg skal hava »bjóðað reiðarum, at fiskimenn skuldu gjalda oljuna«. Burtursæð frá tí, at hetta er beinleiðis ósatt, so var tað soleiðis við samráðingum í mínari tíð, at tað varð einki gjørt, sum nevndin ikki hevði góðkent. Og at Andreas skal hava forpurrað nakað slíkt er reinur fantasiur. Tað hevur hann snøgt sagt ikki førleika til.

Andreas lýsir annars best seg sjálvan, tá hann leggur persónliga eftir næstformanninum í fiskimannafelagnum Eyðun Johannesen og leggur hann púra ógrundað at »hugsa meira um reiðaran enn fiskimannin«.

Nú skal Andreas hevna seg inn á Eyðun, tí hann spurdur av Sosialinum egna vegna avsannaði tey ósonnu tíðindini hjá Jan Højgaard, at ein samd nevnd stóð aftan fyri útkoyringina av Carltonmanningini úr FF. Tað er síðan komið fram, at tað als ikki fanst nøkur nevndarsamtykt í einum slíkum týdningarmikla máli!

Bert í hesum máli hevur formaðurin brotið vanligar felagsreglur, framt rættarbrot og fyrst og fremst sagt ósatt. Tað er ein slík mannagongd, sum Andreas stuðlar og verjir. Tí er eisini óneyðugt at svara meira til hansara.

At hann avdúkar seg sjálvan so dyggiliga og ótilætlað váttar skilið í fiskimannafelagnum skal hann eisini hava tøkk fyri.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.